## Terji á Jóansøkufestivalin

Nú eru vit komin inn í Jóansøkuvikuna, og festivalurin í Suðuroynni, Jóansøkufestivalurin, nærkast. Í gjáramorgunin kunnugjørdi Jóansøkufestivalurin so enn eitt navn, sum skal taka lut á festivalinum. Talan er um Terja Rasmussen, sum fer á pall sum solistur. Terji telist millum størstu tónleikanøvn í Føroyum síðstu nógvu árini, og hann verður mettur at vera ein av bestu entertainarum innan tónleik í Føroyum, tá umrøður live-framførslur.



## Roskilde Festivalurin marknaðarførur Høgna

Høgni Lisberg verður í ár eitt av nøvnunum á Junior Pavallionini á Roskilde Festivalinum. Hetta er pallurin fyri nýggj spennandi nøvn, ið festivalurin hjálpir fram. Á heimasíðu síni er marknaðarføringin farin í gongd. Festivalurin hevur gjørt eina longri samrøðu við trubadurin, ið áður hevur vitjað sama pall á Roskilde Festivalinum sum trummuleikari í Clickhaze. Samrøðan liggur á: roskilde-festival.dk/object.php?obj=62bd2774&code=45, men nú ber eisini til, at hoyra tónleikin hjá Høgna á alnetútvarpsstøðina hjá Roskilde Festivalinum, ið liggur á heimasíðuni hjá Roskilde Festivalinum.Lurta eftir løgunum Morning Dew og Just Dig hjá Høgna og løg hjá nógvum av hinum nøvnunum á Junior Pavalionini á roskilde-festival.dk/object.php?obj=898000c

# Minnisvarði yvir Poul F. í Froðba

**Sunnudagin varð minnisvarði yvir skaldið Poul F. Joensen avdúkaður í Froðba**

POUL F. JOENSEN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nógv fólk var samankomið í Froðba sunnudagin, har minnisvarði yvir skaldið Poul F. Joensen varð avdúkaður.

Tað er Lions Club Suðuroy, ið hevur tikið stig til minnissteinin og vegna felagsskapin bar Óli Holm fram røðu, har hann millum annað fegnaðist um, at minnisvarðin kom at standa í Froðba, har skaldið livdi og virkaði og at sjálvur steinurin er fingin til vega úr haganum í Sumba, haðani Poul F. var ættaður.

Vilborg Michelsen, dóttir Poul F., hevði røðu og greiddi frá lívsleiðini og manninum, sum ikki altíð hevði tað lætt, tí hann varð ikki góðtikin av øllum, og hetta hevði bæði ávirkan á starvsleið, lívsleið og á skaldið sum persón, metti Vilborg Michelsen í góðari og bersøgnari røðu, innan hon tók dúkin av minnisvarðanum. Hon takkaði eisini Lions fyri at hava tikið stig til minnisvarðan, og hon takkaði Hanusi G. Johansen, vísusangara, ið hon metti mestsum hevði fingið pápan til lívs aftur.

Varðin er settur tætt við húsini hjá skaldinum í Froðba. Kirkjukórið Ljómur setti dám á løtuna og Hanus G. Johansen sang eisini løg, ið hann hevur sett til orð eftir Poul F.

Varðin yvir Poul F. stendur eisini tætt við sonevnda Tarvafjósið í Froðba, og Jens Petur Brattalíð frá Lions Club beyð síðani øllum innar í fjósið at fáa ein kaffimunn, og hann legði skemtiliga eina við, at ongin tarvur er í fjósinum longur.

Relieffið í bronsu av andlitsmynd av skaldinum, er gjørt hjá Nordisk Metalkunst hjá Kalsing í Danmark. Árni Ziska, steinhøggari, hevur syrgt fyri teksti og plássinum til myndina á steinum. Økið, har steinurin stendur, hevur Trúgvi Gudmundarson, grótlaðari,laðað.


*Frá avdúkingini sunnudagin*

# Hátíðardámur í Sumba

**Hátíðarguðstænasta var í Sumba sunnukvøldið í samband við, at kirkjan er 120 ár**

KIRKJUSØGA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sumbiar Kirkja er 120 ár, og í hesum sambandi var hátíðarguðstænsta í Sumba sunnudagin.

Við vóru prestarnir Patrick de Neergaard, ið hevði guðstænastuna, og Jónsvein Bech og Ólavur Rasmussen.

Tvøroyrar Hornorkestur spældi og Tóra Vestergaard sang. Lars Mensonides hevði urgufylgispælið.

Eisini sang Sumbiarkórið.

Kirkjan var fullsett og barnadópur var eisini partur av stóru skránni, ið var sett saman í samband við dagin.

Eftir hátíðarløtuna í kirkjuni var hildið fram í samkomuhúsinum, har kórið sang, og drekkamunnur var at fáa.

